betri
DEILDIN

# LEIKSKRÁ

29. mai 2023

SKRÁ NR. 5




KARL ABRAHAMSSON LØKIN NR. 6

KLAKSVÍKAR ÍTRÓTTARFELAG
STOVNAÐ 24.8.1904

# 11. UMFAR

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo




# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

# INNIHALD

Dysturin í dag

Støðan í Betri deildini

TEAM ÍF

TEAM KÍ

Dómarar

Toppskjúttar eftir 10 umfør

Savnsgull 1

ÍF-sangurin



INTERSPORT®
intersport.fo

taf.fo
the athlete's foot®



BIRGIR PETERSEN

# DYSTURIN Í DAG

**Vælkomin til dyst í Betri-deildini.** Seinasta umfar leiktu vit í Hólmanum móti EB/Streymi og har gekk sera illa, og vit taptu 2-1. Kanska tí at mótstøðan var góð, men sanniliga eisini tí, at vit ikki kláraðu at fáa stevið frá fyrr í ár fram aftur. 2-0 í hálvleikinum, og hóast at Mena minkaði um munin í seinna hálvleiki, so fingu vit ikki glið á.

Nú hava okkara menn fingið armarnar niður eftir eina fína byrjan við trimum sigrum, og nú hava vit tapt fýra dystir í trekk, tveir teir seinastu dystirnar ynskja leikarnir nokk at koyra í gloymibókina, tí tey bæði avrikini eru tey vánaligastu í ár. Í dag er nokk ikki tey bestu líkindini at fáa nakað sum helst burturúr, men tað merkir samstundis, at pressið ikki er á okkum, men á mótstøðuni og er hetta okkara møguleiki at fáa skútuna uppaftur á rætt aftur.

Venjarin hjá okkum minnir okkum á, at okkara lið er sett saman av ungum óroyndum leikarum, í hvussu er í fremstu røð, og tá er vandi fyri, at úrslitini kunnu vera svingandi, og at vit mugu vera tolin við teimum. Teir lova at arbeiða knallhart hvønn tann einasta dystin, og biðir hann okkum halda á við at stuðla. Tí tað er hetta, teir liva fyri.

Í dag taka vit ímóti KÍ, sum eru flúgvandi í einum ovara luftlagi fyri seg við 11 út av 11 møguligum, og má sigast, at tann nýggi venjarin Magne Hoseth ikki hevur slept taktstokkinum hjá Mikkjali Thomassen.

Í dag verður spennandi at síggja hvussu dysturin fer at laga seg, tí vit eru teir einastu, sum hava klára at hildið teimum frá at skora inntil endan av dystinum, og harvið varðveitt spenningin longst. Tað sær út til, at maskinan hjá teimum koyrir uppá full speed, so tá er tað einasta, sum vit kunnu gera er at royna at koyra grús í....

**Góðan dyst øll somul.**
**Koyri á drongir**




**BÓLTASTUÐUL:**
Basalt



VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

EFTIR 10 UMFØR

# STØÐAN

## Í BETRI DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 11 | 11 | 0 | 0 | 30 | 5 | +25 | 33 |
| 2 | HB | 11 | 8 | 2 | 1 | 27 | 5 | +22 | 26 |
| 3 | B36 | 11 | 8 | 0 | 3 | 25 | 11 | +14 | 24 |
| 4 | Víkingur | 11 | 6 | 2 | 3 | 24 | 12 | +12 | 20 |
| 5 | 07 Vestur | 10 | 3 | 1 | 6 | 15 | 18 | -3 | 10 |
| 6 | B68 | 10 | 2 | 4 | 4 | 10 | 18 | -8 | 10 |
| 7 | EB/Streymur | 10 | 3 | 1 | 6 | 7 | 17 | -10 | 10 |
| 8 | ÍF | 10 | 3 | 0 | 7 | 10 | 17 | -7 | 9 |
| 9 | TB | 10 | 1 | 3 | 6 | 5 | 27 | -22 | 6 |
| 10 | AB | 10 | 0 | 1 | 9 | 1 | 24 | -23 | 1 |

WWW.DYSTIR.FO

## 11. UMFAR

| | |
|---|---|
| 29.05.23 | HB - EB/Streymur |
| 29.05.23 | B36 - AB |
| 29.05.23 | Víkingur - B68 |
| 29.05.23 | 07 Vestur - TB |
| 29.05.23 | ÍF - KÍ |

## 12. UMFAR

| | |
|---|---|
| 03.06.23 | KÍ - AB |
| 04.06.23 | EB/Streymur - TB |
| 04.06.23 | B36 - Víkingur |
| 04.06.23 | B68 - HB |
| 04.06.23 | ÍF - 07 Vestur |

# KES.FO

**HVS - VENTILATIÓN - HITAPUMPIR - SERVICE**

Hjá Klima Energi Service leggja vit okkum eftir at veita dygdarvørur og -tænastur innan hita, ventilatión og orkuoptimering. Harafturat bjóða vit eftirlit av hitapumpum og ventilatiónsskipanum, bæði til privat og vinnu.

Tørvar tær eina nýggja hitapumpu ella ventilatións- og luftskiftisskipan, ella vilt tú hava vegleiðing um orkuskifti, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.




**INFO@KES.FO - WWW.KES.FO - 258030**

| | | |
|---|---|---|
| Tóri **Traðará** | 1 | |
| Elvio **Gelmini** | 2 | |
| Jan **Ó. Ellingsgaard** | 3 | |
| Tóri **N. Olsen** | 4 | |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 5 | |
| Karl **A. Løkin** | 6 | |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 | |
| Ruben **Møller Nielsen** | 8 | |
| Jhon Edy **Mena** | 9 | |
| Jóhan **Petersen** | 10 | |
| Markus **á Lakjuni** | 11 | |
| Hans Jákup **J. Lervig** | 12 | |
| Jákup **J. Nolsøe** | 13 | |
| Gundur **E. Petersen** | 14 | |
| Jákup **í Lambanum** | 15 | |
| Líggjas **Heðinsson** | 16 | |
| Jóhann **Højbro** | 17 | |
| Petur M. **Lundsbjerg** | 18 | |
| Rúnar **Johnsson** | 19 | |
| Aron **Kensson** | 20 | |
| Rógvi **Matras** | 21 | |
| Elias **Lervig** | 22 | |
| Hans **Jacobsen** | 23 | |
| Gonzalo **Zárate** | 24 | |
| Bergur **Jacobsen** | 25 | |
| Sámal **Zachariassen** | 34 | |

Høvuðsvenjari: **Aleksandar Jovevic**
Hjálparvenjari: **Bartal Eliasen**
Málmansvenjari: **Erling Joensen**
Fysiskur venjari: **Gudmundur Danielsen**
Fysioterapeutur: **Jónfríð Hansen**
Liðleiðari: **Rói D. Olsen**
Liðleiðari: **Heðin L. Olsen**
Liðleiðari: **Fríði R. Petersen**

**INNIHALD**

KLAKSVÍKAR ÍTRÓTTARFELAG
STOVNAÐ 24.8.1904

| | |
|---|---|
| Markus **Pettersen** | 1 |
| Patrick **Da Silva** | 2 |
| Vegard **Forren** | 4 |
| Deni **Pavlovic** | 5 |
| Mads **Mikkelsen** | 6 |
| Árni **Frederiksberg** | 7 |
| Jákup **B. Andreasen** | 8 |
| Páll **Klettskarð** | 9 |
| Luc **Kassi** | 10 |
| Jonn **Johannessen** | 11 |
| Sivert **Gussiås** | 12 |
| René **Joensen** | 14 |
| Símun **Kalsø** | 15 |
| Hannis **Matras** | 16 |
| Jóannes **Danielsen** | 17 |
| Olaf K. **Hansen** | 18 |
| Dávid **B. Andreasen** | 19 |
| Børge **Petersen** | 20 |
| Rói M. **Hentze** | 21 |
| Odmar **Færø** | 22 |
| Heini **Vatnsdal** | 23 |
| Silas **Gaard** | 24 |
| Óli Ey. **Poulsen** | 25 |
| Tóki **á Lógv** | 27 |
| Sølvi **Johannessen** | 28 |
| Jákup N. **Vilhelmsen** | 29 |
| Jóhan **Josephsen** | 30 |
| Claes **Kronberg** | 32 |
| Turi Geza **Tamas** | |

| | |
|---|---|
| Høvuðsvenjari: | **Magne Hoseth** |
| Hjálparvenjari: | **Daniel Berg Hestad** |
| Hjálparvenjari: | **Sjúrður Jacobsen** |
| Málmansvenjari: | **Turi Geza Tamas** |
| Fysioterapeutur: | **Heri Johnsson** |
| Lækni: | **Arnold Jensen** |
| Liðleiðari: | **Sylvan Jakobsen** |
| Liðleiðari: | **Regin Sivertsen** |

DÓMARI

Eiler **Rasmussen**

1. HJÁLPARDÓMARI

Niklas **Petersen**

2. HJÁLPARDÓMARI

Vinjard **Dam**

4. DÓMARI

Petur **Reinert**

DÓMARAEYGLEIÐARI

Jón Kári **í Brekkuni**

magn




Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP

SPEKT løggildir grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo



# TOPP 10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 11 |
| 2 | Mikkel **Dahl** (HB) | 9 |
| 3 | Bjarki **Nielsen** (B36) | 5 |
| 4 | Michal **Przybylski** (B36) | 5 |
| 5 | Árni **Fredriksberg** (KÍ) | 5 |
| 6 | Claes Philip **Kronberg** (KÍ) | 5 |
| 7 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 5 |
| 8 | Uros **Stojanov** (07 Vestur) | 4 |
| 9 | Adrian **Justinussen** (HB) | 4 |
| 10 | Mads **Borchers** (HB) | 4 |

WWW.DYSTUR.FO

SAVNSGULL 1

# Greinar frá eldri leikskráum





ÍF - GÍ
LEIKSKRÁ
2. ÁRG. NR. 1

Dysturin í dag

1. Erling Joensen
2. Torkil Hansen
4. Bartal Eliasen
5. Janus Petersen
6. Roy Róin
7. Røgvi Larsen
8. Egil Zachariassn
9. Mortan Thomsen
10. Áslakur R. Petersen
11. Eyðolvur R. Petersen
12. Alfred Olsen
13. Torstein Joensen
14. Bárður á Lakjuni
15. Rúni Petersen
16. Hergeir Eldevig
17. Chris Knight

Jens Martin Knudsen
Janus Rasmussen
Símun Petur Justinussen
Svend Olsen
Pól Ennigarð
Rúni Justinussen
Pauli Jarnskor
Agnar Hojgaard
Magni Jarnskor (helst skaddu
Sámal Joensen
Henning Jarnskor
Tummas Magnussen
Steve White
Jóan Petur Olsen
Heini Heinason

enjari: Petur Simonsen
jálp. venj.: Bogi Lervig
ðleiðari: Símun Fornagarð
Eilif Eliasen

Venjari: Páll Guðlaugsson
Liðleiðari: Jógvan Gregersen

Dómari
Petur Erhard Kjærb
Linjuverjar úr Sumba

Bóltsponsorur
P/F Alilaks
v/Sigurð S. Simonsen

16

*Erling bjargar skotroyndini, meðan Bárður og Áslakur somuleiðis royna at verja fyri. Eyðolvur sæst aftanfyri Erling. Myndin er frá dystinum millum ÍF og B68 í fjør, og hon er tikin úr **Fótbóltur 96***

# Halasparkið

## Teigurin, har tey tilkomnu kunnu reypa og skriva um "góðu gomlu dagarnar".

HESUFERÐ: **STEINBJØRN Í LAMBANUM**

Í ár hava vit ein nýggjan tátt í leikskránni, sum vit nevna **Halasparkið**. Her kunnu fyrrverandi leikarar o.o. greiða frá ymsum hendingum, sum teimum hevur verið fyri. Vit skulu í dag leggja fyri við ta ferðina, tá ið:

**Málmaðurin hjá ÍF fekk fyrstu málmansbuksirnar**



LEIKSKRÁ — 2. ÁRG. NR. 1

ÍF - GI

**Halasparkið**

**Teigurin, har tey tilkomnu kunnu reypa og skriva um "góðu gomlu dagarnar".**

**Hesuferð: Steinbjørn í Lambanum**

**Í ár hava vit ein nýggjan tátt í leikskránni, sum vit nevna "Halasparkið". Her kunnu fyrrverandi leikarar o.o. greiða frá ymsum hendingum, sum teimum hevur verið fyri. Vit skulu í dag leggja fyri við ta ferðina, tá ið :**

**Málmaðurin hjá ÍF fekk fyrstu málmansbuksurnar**

Tá ið vit byrjaðu at leika í meistaradeildini í 1971, mátti málmaðurin sjálvur syrgja fyri sínum búna. Onkur í Havn hevði kanska málmansbuksur, men eina óreina grøna troyggju, tað var tað einasta eg átti av málmansklæðum.

Tað var soleiðis, at eg sum oftast nýtti floyalsbuksir, tí tær vóru bleytari enn vanligar kovboybuksur, og onkutíð, tá ið sár vóru á beinunum, hevði eg langar undirbuksur innanfyri. Her skal sjálvsagt havast í huga, at talan ikki var um bleytt grasliki, men harðan grúsvøll.

Hendingin eg skal greiða frá fór fram ein vakran sunnudag, vit leiktu í Gundadali móti B36. Helst høvdu vit gott tak á dystinum, og eg man hava kett meg í málinum, tí um miðjan fyrra hálvleik, tá kemur ein smádrongur algoystur rennandi yvir til mín og sigur: "Tú, teir har yviri (hann peikaði yvir ímóti økinum har Bridgehúsið nú er) - **teir** siga, at tú skalt ikki standa "hond í lumma", tí tað er "so forribiið ósportligt". Eg hugdið har yvir - Jú, tað vóru teir báðir Hjalmar, og Grias sum høvdu sent drongin.

Aftaná dystin helt Hjalmar, at nú kundi tað vera "well" - málmaðurin mátti fáa klæðir frá felagnum. Næstu ferð vit spældu í Havn, fóu vit báðir Hjalmar oman í stásiliga ítrótt-arhandilin niðanfyri KFUM, og har fekk eg nýggja málmanstroyggju við lynlási frammanfyri, men buksir fekk eg ongar - tær vóru ov dýrar.

Nei, málmansbuksirnar fekk eg ongar tað árið, men eg stóð ongantíð aftur "hond í lumma" antin eg so var í kovboy- ella fløjalsbuksum.

12

Tá ið vit byrjaðu at leika í meistaradeildini í 1971, mátti málmaðurin sjálvur syrgja fyri sínum búna. Onkur í Havn hevði kanska málmansbuksur, men eina óreina grøna troyggju, tað var tað einasta eg átti av málmansklæðum.

Tað var soleiðis, at eg sum oftast nýtti floyalsbuksir, tí tær vóru bleytari enn vanligar kovboybuksur, og onkuntíð, tá ið sár vóru á beinunum, hevði eg langar undirbuksir innanfyri. Her skal sjálvsagt havast í huga, at talan ikki var um bleytt graslíki, men harðan grúsvøll. Hendingin eg skal greiða frá fór fram ein vakran sunnudag, vit leiktu í Gundadali móti B36. Helst høvdu vit gott tak á dystinum, og eg man hava kett meg í málinum, tí um miðjan fyrra hálvleik, tá kemur ein smádrongur algoystur rennandi yvir til mín og sigur „Tú, teir har yviri (hann peikaði yvir ímóti økinum, har Bridgehúsið nú er) – teir siga, at tú skalt ikki standa „hond í lumma“, tí tað er ”so forribiið ósportligt“. Eg hugdi har yvir – Jú, tað vóru teir báðir Hjalmar, og Grias sum høvdu sent drongin.

Aftaná dystin helt Hjalmar at nú kundi tað verða „well“ – málmaðurin mátti fáa klæðir frá felagnum. Næstu ferð vit spældu í Havn, fóru vit báðir oman í stásiliga ítróttarhandilinniðanfyri KFUM, og har fekk eg nýggja málmanstroyggju við lynlási frammanfyri, men buksir fekk eg ongar – Tær vóru ov dýrar.

Nei, málmansbuksirnar fekk eg ongar tað árið, men eg stóð ongantíð aftur „hond í lumma“ antin eg so var í kovboy- ella fløjalsbuksum.

NÝRÙM

Teknistova
einar@nyrum.fo
tlf 78 88 99



# BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044

Alt kann gerast


## TAKK FYRI STUÐULIN

# Leiðandi reiðarí í norðurhøvum




VARÐIN

P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo



# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**